LM-065/2025

FYLGISKJAL 8

Alda Joensen

Fra: Rønn Eliasen <ronn@fuglafjordur.fo>
Sendt: 3. november 2025 11:55
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Cc: Ria Torgarð
Emne: VS: Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.
Vedhæftede filer: Viðmerking til LLR um lógarbroyting.pdf

Gáðan dag
Við hesum sendi eg viðmerkingar frá Riu Tórgarð, limi í Leiklistaráðnum.

Vinarliga / Best regards

Rønn Eliasen, forkvinna í Leiklistaráðnum

Fra: Ria Torgarð <riatorgard@gmail.com>
Sendt: 3. november 2025 11:45
Til: Barbara Hentze í Stórustovu <Barbara@tjodpallur.fo>
Cc: Rønn Eliasen <ronn@fuglafjordur.fo>; Arnfinnur Nesá <arnfinnurnesa@gmail.com>; Benjamin Gaasedal <bg@benjamin.fo>; Heini Gaard <heinig@torshavn.fo>; Vár Berghamar Jacobsen <varberghamarjacobsen@gmail.com>; Harald Thompson Rosenstrøm <harald@tjodpallur.fo>
Emne: Re: Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.

Góða ráð,
Viðfest er viðmerking frá mær um broyting í Løgtingslóg.
Vinaliga
Ria Tórgarð

On Mon, Nov 3, 2025 at 10:10 AM Barbara Hentze í Stórustovu <Barbara@tjodpallur.fo> wrote:

👍

Vinaliga

Barbara Hentze í Stórustovu
Dramaturgur og samskipari
barbara@tjodpallur.fo
Telefon: 51 50 37

TJÓÐPALLUR FØROYA

Tjóðpallur Føroya
Tórsgøta 9
FO-100 Tórshavn

info@tjodpallur.fo
Telefon: 31 86 17

www.tjodpallur.fo

Fra: Rønn Eliasen <ronn@fuglafjordur.fo>
Sendt: 3. november 2025 01:26
Til: Arnfinnur Nesá <arnfinnurnesa@gmail.com>; Barbara Hentze í Stórustovu <barbara@tjodpallur.fo>; Benjamin Gaasedal <bg@benjamin.fo>; Heini Gaard <heinig@torshavn.fo>; Ria Torgarð <riatorgard@gmail.com>; Vár Berghamar Jacobsen <varberghamarjacobsen@gmail.com>
Cc: Harald Thompson Rosenstrøm <harald@tjodpallur.fo>
Emne: Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.

Góða Ráð

Viðmerkingar til uppskot til broyting av ll skal vera inni í morgin, 3. nov. kl. 12:00.

Eg havi tvær viðmerkingar.

Kunnu tit gera viðmerkingar, betri orðingar, alla annað til viðfesta.

Vinaliga

Rønn Eliasen, forkvinna

LM-065/2025

Palllist/Leiklist

Eg havi hesar viðmerkingar:

Viðvíkjandi heitinum á listagreinini, sum á donskum kann eita “scenekunst” ella “skuespilkunst” - á enskum “dramatic art” ella “performing art” - á fronskum “art dramatique” ella “arts du spectacle” - eri eg als ikki samd við at listagreinin, sum eg havi arbeitt við í útvið 40 ár, nú fær nýtt heiti, nevniliga palllist.

Eg skilji væl, at orðið palllist hevur eina breiðari merking og kann umfata aðrar listagreinar innan útinnandi listina - eitt nú dans, opera, sangleik, teaturkonsertir - sum í sær sjálvum eru listagreinar, ið sum oftast verða útintar á einum palli.

Tó haldi eg tað vera púrasta burturvið at mítt fak, mín list, ikki longur eitur leiklist.
Tað er í leiklistini at allar aðrar listagreinar sameinast, hetta hevur verið almen vitan í øldir, líka síðani forngrisku tragediurnar vórðu til. Skrivaða orði, visuella úttrykkið, tónleikur og ljóð, dansur, búna sniðgeving, masku sniðgeving, ljós sniðgeving, pall sniðgeving eru allar sjálvstøguðar listagreinar, ið koma inn í leikhúsið við sínum serligu førleikum. Men kjarnu listagreinin í leikhúsinum vil og skal altíð vera leiklistin.

Eg síggi ein vanda í at yrkis leiklistafólk, sum av fyrstan tíð stríddust fyri eini serstakari stuðulsjáttan til sjálvstøðugar leiklista verkætlanir, nú verða skúgvað til viks av øðrum listagreinum. Við hesum meini eg ikki, at aðrar listagreinar ikki skulu fáa stuðul, men av tí at fleiri av hesum hava aðrar stuðuls møguleikar, er serstaka stuðulsjáttanin til yrkisleiklist einasta reina játtan til listagreinina LEIKLIST.

Eg eri sostatt ikki samd við at broyta heitini í lógini til “yrkispalllist” og “áhugapalllist”
Eg eri als ikki samd við at ráðið skal skifta navn til “Palllistaráðið”, men mæli til at varðveita upprunaheitið “Leiklistaráðið”.